**Røða hjá Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum helt til handan av mentanarvirðislønum landsins í Miðnámi í Vestmanna, 18. oktober 2023**

Góðu tit øll

Í kvøld eru vit savnað í Miðnámi í Vestmanna, nú vit heiðra nøkur av okkara fremstu menta- og listafólkum og handa mentanarvirðislønir landsins fyri 2023. Tað er mær ein stórur heiður at bjóða tykkum øllum vælkomnum – tykkum, sum vit við gleði og takksemi heiðra í kvøld, tykkum mongu sum fara á pall at ríka okkum løtuna, tykkum, sum eru komin higar at uppliva løtuna saman við okkum øllum í kvøld – og ikki minst tykkum, bæði nær og fjar, sum fylgja við í Kringvarpi Føroya, sum setur øll segl til, fyri at vit kunnu fáa eitt gott kvøld saman. Hjartaliga vælkomin øll somul.

Handanin av mentanarvirðislønum hevur verið ein liður í mentanarpolitikkinum hjá landinum seinastu 25 árini. Fyrsta Mentanarvirðisløn landsins varð latin í 1998, tá ið tónaskaldið Regin Dahl varð heiðraður, og í kvøld verða tríggjar virðislønir handaðar: Serstaka virðisløn landsins fyri 2023, Heiðursgáva landsins fyri 2023 og Mentanarvirðisløn landsins fyri 2023.

Umframt hesar tríggjar virðislønirnar verður eisini ein sømdargáva kunngjørd í kvøld. Eins og undanfarin ár er tað bókbindarin á Landsbókasavninum, ið hevur bundið inn vøkru heiðursbrøvini.

Harumframt er ein spennandi skrá við røðum og framførslum. Vit kunnu gleða okkum til eitt fjølbroytt kvøld við mentanarligari og listaligari dygd í hásæti.

Í kvøld er tað Miðnámsskúlin inni á fjørð í Vestmanna, sum er fjálgi karmurin um handanina av mentanarvirðislønum landsins. Miðnámsskúlin í Vestmanna er serstakur, tí skúlin bjóðar fram eina tilfeingisbreyt á miðnámi, eina aliútbúgving og eitt ferðaleiðaraskeið - útbúgvingar, ið á hvør sín hátt taka støði í føroyska samfelagnum, í føroyskari náttúru og tilfeingi - og sum við denti á tað lokala, grøna og globala peika beint inn í framtíðina.

Hjartaliga takk til Vestmanna kommunu og til Miðnám í Vestmanna fyri, at tit hava bjóðað tykkum fram at hýsa tiltakinum í kvøld.

Tað er fyrstu ferð, at mentanarvirðislønirnar verða handaðar í Vestmanna, men tað er ikki fyrstu ferð, at vestmenningar verða heiðraðir við mentanarvirðislønum.

Nógv eru tey menta- og listafólk í Vestmanna, ið hava sett spor eftir seg og skapað ringar í vatninum. Eg fari ikki at nevna øll, tann listin er ov langur, men eg havi hug at nevna Martin Joensen, sum við síni virknu skapan hevur ríkað føroyska tónleika- og mentalívið í so heilt serstakt mát, eisini saman við Vestmonnum. Mentanarlívið í Vestmanna kann heldur ikki verða umrøtt uttan at nevna mentanarvitan Jonhard Mikkelsen og Sprotan. Her er ein drívmegi og skapanartrongd, sum valla hevur sín líka.

Og kanska er tað upprunin - tilfeingið - ið er grundarlagið.

Vestmanna er góð og vøkur náttúruhavn við sonnum náttúruperlum í haga og bjørgum. Fólk settu búgv her tíðliga í tíðini, og her hevur verið - og er - ein støðug menning og

nýskapan - vinnulig, samfelagslig og listalig. Samskifti, fiskivinna, orkuútbygging, skúli, mentan, list og ítróttur hava sett - og seta - Vestmanna á landkortið.

Síðst í 1980-unum gjørdist bygdin kend fyri, at kvinnurnar vunnu kommunuvalið, og kvinnulistin, við Mariu Hansen sum borgarstjóra, stýrdi kommuni gjøgnum fíggjarligu brotasjógvarnar upp gjøgnum 1990-ini. Tær vóru undangongukvinnur og fyrimyndir.

Tá undirsjóvartunnil kom millum Streymoy og Vágar, setti tað síni spor, at ein stórur partur av samferðsluni í bygdini hvarv frá degi til dags.

Í yrkingasavninum Sunnudagsland, sum er eitt savn av yrkingum til heimstaðin, lýsir Sissal Kampmann hvussu tað var at koma aftur til heimstaðin og skula finna seg til rættis í bygdini – her, ið fjøllini hyggja inn í køkin.

Hóast huglagið í savninum er kritiskt og stundum dapurt, so er her eisini ein kensla av at hoyra til, sum í hesum reglunum:

*Her siti eg.*

*Miðskeiðis í Sunnudagslandi.*

*Síggi*

*Heljareyja til vinstru,*

*Fossá til høgru.*

*Mitt ímillum,*

*lítlu tutlandi ánna.*

*Í hesum siti eg og hugsi,*

*um hesin staður átti*

*at verið hin besti,*

*tí hann er mín?*

Við hesum orðum fari eg at ynskja okkum øllum eitt gott kvøld saman.

Gerið so væl.

---

**Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum**